Guðrið Andorsdóttir, forkvinna í Granskingarnevndini

Góða landsstýriskvinna, gott fundarfólk.

Vælkomin øll somul.

Søgan um gransking í Føroyum fer langt aftur í tíðina. Søguliga vóru tað bæði føroyingar og útlendingar sum komu at granska og lýsa okkum.

Føroysk gransking spennir víða, frá heilt grundleggjandi kanningum av náttúruni, av tí menniskjaliga samfelagnum, av føroyska málinum til gransking, sum er beinleiðis rættað ímóti at skapa vitan sum t.d. kann brúkast sum ein liður í at menna heilivág til sjúkur, sum ov lítil vitan finst um í dag, ella t.d. brúka støddfrøði til at skapa tøkni til at gera bløðgilinjur til alivinnuna.

Las herfyri í donsku hvítbókini VIDENSKABENS BETYDNING FOR SAMFUNDET um, at tað er týdningarmikið at minna seg á, at sjálvt fyri gransking sum er til nyttu fyri eitt samfelag, kunna ganga nógv ár, áðrenn úrslit kemur ordiliga til nýtslu.

Tað er eisini týdningarmikið at minna á, at nógvir mátar at nýta eitt granskingarúrslit ikki kunna sannkennast, fyrrenn úrslitini fyriliggja, og at nógvar av teimum uppdagingum, sum í dag hava størst nyttuvirði, eru gjørdar uttan tilvit um, hvussu tær kundi nýtast einaferð í framtíðini.

Danskarin Ørsted hevði neyvan hugsað sær allar teir nýtslumøguleikar, elektrisitetið fór at fáa. Um ikki hansara gransking var komin av forvitni rætta móti, hvussu náttúran virkar, men heldur varð stýrt av einum ynski um at fáa betri ljós akkurát tá í tíðini, høvdu vit í dag – ístaðin fyri LED perur – kanska havt størri og betri stearinljós.

Hetta kann vera við til at vísa okkum týdningin av at hava eina sunna javnvág millum ta granskingina, sum leitar eftir einari djypri fatan av náttúru, menniskja, samfelag og á hinum bógvinum gransking, sum roynir at menna nyttuna av tí grundleggjandi granskingini.

Granskingin sum hevur sín uppruna í forvitni hjá granskaranum eins og granskingin sum stavar frá tørvum sum samfelagið ásetur, eru ymisk sløg av gransking, sum kunna skapa sínámillum íblástur og ágóðar til gagns fyri okkara samfelag.

Tað eru 20 ár síðani fyrsta føroyska granskingarráðið varð ásett við lóg. Umsitingin í Granskingarráðnum hevur gjørt eina skrá fyri hátíðarhaldið í dag, har vit fara at hyggja aftur á farnu árini, og fram ímóti komandi avbjóðingum og ætlanum. Á skránni eru røður og framløgur.

Nú gevi eg stjóranum í Granskingarráðnum, Anniku Sølvará orðið.

Vælkomin øll, enn einaferð.